UTTAN ÚR HEIMI

## Gadafi vorðin friðarmaður

Libyski forsetin, Muammar al-Gadafi, sigur nú, at hann hevur biðið leiðararnar í Norðurkorea sleppa øllum ætlanum um at fáa sær kjarnorkuvápn.

Í vikuni hitti Gadafi suðurkoreanska uttanríkisráðharran, Ban Ki Moon, og har greiddi hann frá, at hann hevur havt samband við norðurkoreonsku stjórnina og biðið hana slaka fyri altjóða trýstinum. Gadafi gjørdi tó greitt, at eftir hansara tykki eigur altjóða samfelagið at hjálpa Norðurkorea, so landið verður fört fyri at nýta sína kjarnorkutøkni til friðarlig endamál.

USA hevur illgruna um, at Norðurkorea hevur gjørt minst tvær kjarnorkuløðingar, og at landið hevur fingið hjálp og útgerð úr Iran. Libya játtaði fyri einum ári síðani at sleppa sínum kjarnorkuætlanum aftur fyri at fáa altjóða viðurkenning. Tað hevur millum annað havt við sær, at øll tiltøk ímóti Libya eru sett úr gildi, og Gadafi hevur eisini tikið lut í fleiri altjóða tiltøkum síðani.

## Lova stuðul til Afrika

Á heimsráðstevnuni um politikk og búskap í sveisiska býnum Davos hava viðurskiftini í Afrika verið eitt av høvuðsevnunum.

Fleiri hava vístá, at malaria og aðrar sjúkur hava ongantíð kravt so mong manalív í Afrika sum nú, og fyrradagin lovaðu fleiri at játta meiri pengar til bardagan ímóti sjúkunum. Teirra millum, sum tóku orðið í tí sambandi, vóru fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton, bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, Microsoft-stovnarin Bill Gates og írska rockstjørnan Bono.

Í sínari røðu segði Tony Blair, at bretska stjórnin hevur játtað 600 milliónir krónur eyka til bardagan ímóti malaria í Afrika. Hann heitti á altjóða samfelagið um at gera tað sama og vísti á, at á hvørjum ári doyggja ein million afrikanarar av malaria, tey flestu børn.

Bill gates hevur fyrr boðað frá, at hansara grunnur fer at játta einar fýra milliardir krónur til bardagan ímóti ymsum sjúkum.

## Størri samstarv í oljuvinnuni

Týskland vil fegið hava tættari samstarv við Noreg á oljuøkinum, og londini eru vorðin samd um at seta eina felags nevnd at leggja samstarvið til rættis.

34 prosent av oljuni og gassinum, sum týskarar innflyta, kemur av teimum norsku oljuleiðunum, men á einum fundi í Bremen í vikuni kom fram, at týskarar vilja fegnir keypa uppaftur meiri olju og gass úr Noregi.

Men týskarar hava eisini áhuga fyri samstarvi í sjálvari oljuvinnuni. Týskland og Russland hava longu skrivað undir ein sáttmála um samstarv í tí russiska partinum av Barentshavinum, og ein slíkan vilja týskarar fegnir hava við Noreg. Norski vinnumálaráðharrin, Børge Brende, sigur við Aftenposten, at nú skulu serfrøðingar kanna, hvussu samstarvið ímillum norskar og týskar fyritøkur í oljuvinnuni kann økjast.

## Gongur væl hjá Nokia

Finska stórfyritøkan Nokia boðaði í gjár frá, at hon hevði næstan tvær milliardir kónur minnui í avlopi í oktober ársfjórðingi í fjør enn í 2003, men kortini var hetta betri, enn serfrøðingar høvdu roknað við. Tað gjørdi eisini, at virðið á partabrøvunum í fyritøkunu hækkaði alt fyri eitt.

Sambært tíðindastovuni SME hevði Nokia góðar 10 milliardir krónur í avlopi í seinasta ársfjórðingi, og tað var umleið 15 prosent meiri, enn serfrøðingarnir høvdu væntað. At úrslitið var heldur lakari enn í sama ársfjórðingi í 2003 komst sambært stjóranum, Jorma Ollila, av, at fartelefonsølan minkaði, og at prísirnir komu í eina meiri fasta legu.

– 32 prosent av øllum fartelefonum, sum vórðu seldar í fjør, vóru av slagnum Nokia, skrivar SME.

# Eitt eiti av einum vali

*Uppreistrarmenn hava oyðilagt fleiri av valstøðunum. Soleiðis sá hetta valstaðið í býnum Samarra út í gjár*

*Uppreistrarleiðarin al-Zarqawi og hansara menn hava rætt nógvar irakar frá at fara á val í morgin.*

**Í morgin er tjóðartingsval í Irak, men nógvir veljarar tora ikki á val, og teir vita heldur ikki, hvørji valevnini eru**

IRAK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg tori ikki á val, men eg eri noyddur at fara, tí vit hava fingið at vita, at fara vit ikki á val, fáa vit ikki meiri at eta, sigur tann 52 ára gamli vaktarmaðurin Amin Hajar við tíðindastovuna IPS.

Hann er vaktarmaður uttan fyri ein skúla í Bag-dad, tí skúlin skal nýtast sum valhøli í morgin. Men hetta er ikki ein vanligur skúli ella eitt vanligt valstað, tí kring skúlan eru byrgingar við sandsekkjum og píkatráði. Myndugleikarnir hava roynt at dylja, hvar valstøðini eru, men sandsekkirnir og píkatráðurin vísa, hvørji støð myndugleikarnir hava valt.

Tað hava uppreistrarmenninir eisini sæð, og teir seinastu dagarnar hava teir sprongt fleiri skúlar í luftina. Sambært AFP kostaðu slík álop 30 irakum og tveimum amrikanarum lívið hósdagin.

Ringast stendur til í tí sokallaða sunni-trýhyrninginum norðan fyri bagdad, men í høvuðsstaðnum kunnu veljararnir heldur ikki kenna seg trygg. Ein tíðindamaður hjá New York Times, sum hevur verið í Bagdad teir seinastu dagarnar, sigur, at hvørki amerikananarnir ella iraksku myndugleikarnir kunnu veita fólki vissu fyri, at einki fer at henda teimum, tá og um tey fara á val. Bara í síðstu viku brustu 37 bumbur og 52 rakettir í býnum.

Amerikanska herleiðslan hevur sagt, at sambært einari kanning fara 80 prosent av fólkinum í Bagdad á val, men tá tíðindamaðurin hjá New York Times spurdi 20 fólk í býnum, um tey ætlaðu sær á val, var tað bara ein, sum játtaði.

### al-Zarqawi

Tí eingin veit, hvat kann henda í morgin. Uppreistrarleiðarin al-Zarqawi hevur kunngjørt, at tey, sum fara á val, eru svíkjarar og hava ikki uppiborið annað enn deyðan.

Tað er eingin ivi um, at al-Zarqawi er ein týðandi maður í Irak í hesum døgum. Hann hevur lovað at oyðileggja valið í morgin, og nógv bendir eisini á, hann er førur fyri tí.

– Vit hava sent demokratinum og tess óndu hugsjónum krígsavbjóðing, og hon er eisini galdandi fyri tey, sum fylgja hesum hugsjónum, segði hann í einari kunngerð fyri nøkrum døgum síðani.

al-Zarqawi hevur stórt vald, tí tað er sjálvur Osama bin Laden, sum hevur valt hann at standa fyri áganginum í Irak. Bæði amerikananar og irakska stjórnarráðið hava boðið sær til at rinda 25 milliónir dollarar í finningarløn, vil onkur avdúka, hvar hann fjalir seg, men enn hevur eingin svikið hann. Hvørki amerikananar ella irakiska leiðslan vita, hvar hann er, men teir halda, at hann er onkunstaðni í Irak.

Hansara uppfatan er, at demokrati stríðir ímóti teirri islamsku læruni, og tað ætlar hann sær at prógva - ikki við einum atkvøðuseðli, men við brýndum knívi, skrivar New York Times.

Tað eru ikki bara teir iraksku veljararnir, sum taka hann í álvara. 7.800 fólk eru uppstillað til valið í morgin, men 7.000 teirra hava valt at dylja, at tey stilla upp.